# Leivur Øssursson



## Undirvísingargongd til miðdeild

## Læraravegleiðing

Høvundar: Elin Maria Óladóttir Olsen og Sigurlaug Fossdal

## Endamál

Undirvísingargongdirnar eru skipaðar soleiðis, at allir næmingarnir læra eina samlaða kvæðaheild. Hetta so at næmingarnir fáa samanhangandi undirvísing í kvæðum gjøgnum alla skúlagongdina, soleiðis, at teir á hvørjum ári kunnu taka afturíaftur tey kvæði, sum teir hava lært árini frammanundan, og harvið kann dansurin ganga smidligari.

Afturat hesum eru vísur, ið verða tiknar upp á hvørjum ári, umframt at aðrir barnasangir kunnu nýtast at læra stevið.

Eisini mæla vit til at byrjað verður at læra dansispøl longu í grunddeildini.

Við hesi undirvísingargondini eru eisini nøkur spøl, sum kunnu nýtast at læra kvæðini uttanat.

### Vísur at taka upp á hvørjum ári

- Øskudólgur & sópingarkonan
- Kall og Svein ungi
- Veturin kom
- Burtur á heiði
- Telja jólini
- Korn på sorn
- Kráka situr á steini
- Nú liggur ein kavafonn tindi á
- Eg kendi mær ein ríkmann

## Byrjanardeild

- Nykursvísa
- Torkils døtur
- Ólavur Riddararós

### Dansispøl

- Ríða ediling
- Seman seman nemar
- Dansa í ringi
- Bandadansur
- Gamlaketa
- Sandoyardansur

## Miðdeild

- Brestiskvæði
- Sigmundskvæði yngra
- Leivur Øssursson
- Stolt Signhild

## Hádeild

- Ormurin Langi
- Flóvin Bænadiktsson
- Uppskot til eyka (Havnargentan kvøður)

### Sangir, ið kunnu brúkast at læra stevið

- Omma Ludvík
- Andras Dunna
- Góðan morgun ketta mín
- Buss-Óli
- Grønir menn frá Pluto
- Hvør er hasin, ið situr har?

**Í undirvísingini í føroyskum dansi eiga hesi evni at vera nomin við:**

- Hvat er føroyskur dansur?
- Stev
- Læra kvæði uttanat
- At brúka allan kroppin at dansa við
- Hvat merkir tað at skipa?
- Hyggja í eyguni hvør á øðrum
- Munurin á at syngja og kvøða

Tað hevur stóran týdning, at hetta ikki einans er uttanatlæra, men hevur eitt endamál, og at tað er **stuttligt.**

# Leivskvæði

Gevið ljóð og lýðið á,
meðan dagur líður,
kvøðið um Leivur Øssursson,
tann hin garpin fríða.

*Stígum fast á várt gólv,*
*sparum ei vár skó,*
*Gud man ráða,hvar vit drekka onnur jól.*

2. Leivur vaks hjá Tróndi upp
bæði vænur og vitur,
vaksin var hann menniliga,
og fagur var hans litur.

3. Tróndur situr í hásæti,
ræður hann so at telja:
"Gift teg, Leivur Øssursson,
tú hevur gott í at velja.

4. Sigmunds einkja á Skúvoy býr,
hon eigur dóttur væna,
tú fært ikki mætari giftu,
hevði tú fingið hana."

5. Leivur svaraði brádliga:
"Hana kann eg ikki fáa,
hennara móðir ber hat til mín,
og hon man henni ráða."

6. Til tað svaraði Tróndur gamli,
heldur at tí gaman:
"Eg skal sjálvur fylgja tær,
tit skulu væl víst koma saman."

7. Klæddust teir í skarlak,
klæddust teir í skrúð,
vundu upp segl á Tróndar skútu
at vinna ta ríku frú.

8. Inn kom sveinur í Skúvoy,
talar so fyri orð:
"Eg síggi eina so stóra skútu,
sigla mót Dalaskor."

9. Eg síggi eina so stóra skútu
undan skorum líða,
sólin skínur so fagurliga
á teirra seglið fríða."

10. „Sært tú skip mót Dalaskor,
sól í segl at skína,
vera man onkur ungur maður
at biðja dóttur mína."

11. Hildu síni ferðini
beint mót oynni vestur,
so gingu teir frá strondum niðan
Tróndur og Leivur reysti.

12. Leivur gekk at húsum fram
inn um hallardyr,
eingin hevur sæð reystari ungling
komið í oynna fyrr.

13. Tróndur stendur á hallargólvi,
ber fram kvøðu sína:
"Hoyr tú, ríka Sigmunds einkja,
gev honum dóttur tína."

14. Tað var ríka Sigmunds einkja,
var so bráð at svara:
"Tað er mær so hart ímót,
hon skal so burtur fara.

15. Øssur tók alt Sigmunds góðs,
tað er frætt so víða,
Leivur, væntar tú mína dóttur,
leingi skalt tú bíða."

16. Tróndur stendur á hallargólvi,
mundi ei orðum spara:
"Leiðið mær moyggj í høllina inn,
sjálv fyri seg at svara."

17. Inn kom Tóra Sigmundsdóttir,
svarar so fyri seg:
"Leivur, er tað títt ørindi,
at tú vilt hava meg?

18. Eg leggi tær tríggjar treytir á,
kanst tú tær uppfylla,
so lovi eg tær trygdarorð,
títt ørindi gongur ei illa.

19. Tann fyrsta treytin, tú svørja skalt,
tú voldi ei Sigmunds deyð,
onnur, tú skalt mannin nevna,
sum voldi ta stóru neyð.

20. Tann triðja treytin, eg sigi fram,
tað eigur tú helst at gera,
tú skalt hevna mín faðirs deyð,
so skal eg tín hústrú vera."

21. Leivur stendur á hallargólvi,
klæddur í skarlak reyða:
"Tað svørji eg við sannan Gud,
eg voldi ei Sigmunds deyða."

22. Til tað svaraði Tróndur gamli:
"Tað skulu tit snart frætta,
hoyr tú, Leivur mín fostursonur,
hitt skal eg útrætta."

23. Vundu teir sítt segl í rá,
teir sigldu av Skúvoyar landi,
strikaðu ikki á bunka niður
fyrr enn á Gøtu sandi.

24. Nú skal taka upp annan tátt,
tað liggur líka raðið,
kvøða skal um Torgrím Illa,
hagar vendir kvæðið.

25. Tróndur kemur upp árla morgun,
man meg rætt um minna:
"Nú skal fara til Suðuroyar,
og Torgrím skal eg finna."

26. Gingu teir til strandar oman,
allir fylgdu Trónda:
"Nú skal gista mannin tann,
teir kalla Torgrím ónda."

27. Sigldu teir til Suðuroyar
á tann sama dag.
Tróndur hevði sítt rúnarkelvi,
ikki gloymdi hann tað.

28. Torgrímur stendur for hallardurum
hyggur út frá landi:
"Hvat man vilja Gøtu Tróndur
her á mínum sandi?"

29. Torgrím átti synir tveir,
sigst í kvæði mínum,
óndir og argir av sinnalag,
teir líktust faðir sínum.

30. Tróndur talar til Torgrím Illa:
“Tað sigi eg tær enn,
eg biði teg um hús í nátt
for meg og mínar menn.“

31. Tróndur talar til Tórgrím Illa:
“Eg vil ikki yvir tað tiga,
hvat talast her um Sigmunds deyða?
Tað skulu tit mær siga“

32. „Her talast so mangt um Sigmunds deyð,
sum tær søgur ganga,
tey halda, Tróndur hans lívið tók,
tá hann hevði allar fangað.

33. Summir halda, hann doyði av møði
av tí svimjing stranga,
summir halda, hann myrdur varð,
so ymisk tíðindi ganga.“

34. „Tað, tú sigur, hann myrdur er,
tað man vera tað sanna,
tú ert tann maður, tann gerning gjørdi,
sig mær einki annað!“

35. Tróndur talar til sínar menn:
“Gerið á mínum ráðum,
bindið mær hann Torgrím Ónda
við sínum synum báðum.

36. Síðani skal eg tykkum vísa,
hvussu teir tríggir doyðu,
antin teir vórðu á landi dripnir
ella á havinum breiða.

37. Kyndið mær eld á eldstaðin,
træverk harum gerið,
tá má eingin tala eitt orð,
tigandi allir verið“

38. Tróndur settist í sessin tann,
ið stóð millum eld og verkið,
manaði hann teir tríggjar upp,
tann gandakallurin sterki.

39. Hurðin gekk so harðliga,
bleikt tað ljósið skínur,
maður kom í høllina inn
og mitt á gólvið trínur.

40. Dravvát klæði á kroppi hevði,
hendur út hann breiddi,
síðani gekk av durum út,
sum rúnarkelvið leiddi.

41. Hurðin gekk á øðrum sinni,
harðari hon smeldi,
maður kom í høllina inn,
og hann gekk tætt at eldi.

42. Leggur hann hendur á træverk niður,
sjógvur úr honum streymar,
tá blotnar hjartað í gøtumonnum,
rætt sum kavi kreymar.

43. Hamur gekk av durum út,
einki ilt hann gjørdi,
allir tagdu innanhallar,
eingin orðið førdi.

44. Tað leið ikki longur um
enn eina so lítla stund,
tá brast hurðin so harðliga upp,
sum alt hevði gingið í grund.

45. Stórur maður í høll kom inn
við blóðigum høvur í hendi,
reyðan kappa á kroppi bar,
hann snart at durum vendi.

46. Tróndur stóð frá sessi upp
og sær til sveinar vendi:
“Tað kunnu tit nú sjálvir síggja,
hvat var teirra endi.

47. Sigmundur víst myrdur er,
tí bar hann høvur í hond,
Einar og Tórir druknaðir,
í sjónum góvu upp ond.

48. Sigmundur átti ein stóran ring,
hann var av reyðargull',
kunnu vit hann hjá Torgrími finna,
so er sakin full.“

49. Leitaðu teir í Torgríms húsi
eina langa stund,
funnu teir hann í eini kistu,
í spjarrum var hann vundin.

50. Tróndur talar til sínar menn:
“Gerið ei tíðina langa,
reisið ein gálga av sterkum bjálkum,
har skal Torgrímur hanga.“

51. Tróndur og hans fylgisveinar
vóru allir í ráðum,
hongdu hann so í gálgan upp
við sínum synum báðum.

52. Tróndur aftur til Gøtu fór,
tá hann hevði tað útrættað.
Leivur fróur í hjarta var,
tá hann fekk tað at frætta.

52. Leivur fór til Skúvoyar aftur,
til sína hjartans kæru:
“Nú er hevndur faðir tín,
nú skalt tú mín hústrú vera.“

53. Leivur ektaði Sigmunds dóttur,
so er frá tí skrivað,
ikki hevur frægari maður
her í Føroyum livað.

*Jens Christian Djurhuus,
Sjóvarbóndin, (1773-1853) yrkti.
Uppskriftin her er úr Gyltubók,
men okkurt er broytt eftir Nýggju
Kvæðabókini hjá Sverra Egholm –
sum tað verður kvøðið í dansi. jd.*

# Undirvísingargongd

Henda undirvísingargongdin er skipað sum uppskot til at taka inn ímillum stirvnu uttanatlæruna, sum eisini er neyðug.

Næmingarnir læra seg nøkur ørindi uttanat, og skotið verður upp, at lærarar í flokkinum tosa saman um, hvussu hetta skal skipast. Umráðandi er, at føroyski dansurin ikki eina liggur á føroyskt undirvísingini. Lærarar í øðrum lærugreinum kunnu hoyra næmingarnar í ørindunum. Eitt hugskot er, at lærarar floksins hoyra næmingarnar, tá ið høvið býðst, ella at avtala er um t.d. 1. tíma hvønn dag. Flokslærarin hevur tó ábyrgdina. Snilt og lætt er at lata ein kekklista liggja í pultsskuffuni, *Fylgiskjal 5* og so gongur lærarin runt og hoyrir næmingarnar, meðan teir sita og arbeiða við ymiskum uppgávum. Á henda hátt ber til hjá øllum lærarunum at hava fingurin á pulsinum við, hvussu langt næmingarnir eru komnir. Eisini ber til at geva ein vinning til tann, ið fyrstur er at læra seg øll ørindini.

Leivur Øssursson er famhald av søguni um Sigmund Brestisson úr Føroyingasøgu og kemur inn á bæði Sigmund og Trónd. Hartil ber til at seta kvæðið í samband við Brest, Beinir og Havgrím umframt lívið, ið var tá. Tí hóskar kvæðið seg væl inn í lærugreinirnar søgu og føroyskt.

Í landalæru ber til at vísa á staðarnøvn í kvæðinum. Hvar búði Leivur Øssursson? Hvar fór Leivur at biðja sær konu? Og hvar fór Tróndur at hevna Sigmunds deyða?

Samstundis er umráðandi í øllum lærugreinum at stimbra minnið hjá næmingunum.

Tað er eitt gott hugskot at lesa alla undirvísingargongdina ígjøgnum, áðrenn farið verður í gongd. Summi hugskot kunnu nýtast fleiri ferðir í kvæðaundirvísingini.

# Innleiðsla

*Kvæðið frá í fjør er Sigmundskvæði yngra, tí kenna næmingarnir til hansara, og er hann eitt* áhugavert *byrjanarstað til Leiv Øssursson. Er talan um 4. flokk, høvdu næmingarnir annað kvæðið í fjør, og tí kann vera týdningarmikið at greiða eitt sindur frá Sigmundi og leikluti hansara í Føroyingasøgu. Næmingarnir hava* áður *roynt at dansað føroyskan dans og kenna tí eitt sindur til ymsu spølini.*

Áðrenn **farið verður í holt við at læra kvæðið:**

Set næmingunum spurningin:
- skulu vit læra kvæði? hví/hví ikki?

Føroyskur dansur er sjálvandi ein kulur partur av okkara mentan.
Fyrst kunnu tit lurta eftir parti av, ella øllum *kvæðinum*.

Tit kunnu eisini hyggja eftir *fótbóltsspælarum, sum dansa føroyskan* dans eftir vunnan dyst. Í hesum sambandi kunnu vit tosa um, nær vit dansa føroyskan dans.

Tit kunnu eisini hyggja eftir nútímans tulkingum av kvæðum hjá *Týr*, *Hamradun* ella *Raske Drenge*.

Tikið verður afturíaftur, hvat kvøðing og føroyskur dansur er.

Her kann verða tosað um:
- Hvat var undirhald áðrenn telefon, teldu, sjónvarp, útvarp osfr.
  - Frásøga í kvæðum
- Hvat er føroyskur dansur?
- Munur er á dansi og kvæðum frá bygd til bygd,
  tí søguliga var sambandið ikki so gott

Eisini verður tosað um tað **at skipa.**

Tosað verður um, at kvøðing er ein frásøguháttur, og at skiparin sigur frá søguni.

Mint verður á, at skiparin altíð byrjar ørindið, og hini koma ikki uppí, fyrr enn eitt sindur inni í ørindinum. Eisini er tað skiparin, ið ger av ferðina í kvæðinum, so eingin eigur at yvirhála henda.

## Næmingarnir fáa kvæðið handað

Fyrst mugu næmingarnir skilja, hvat søgan snýr seg um.

Lærarin greiðir næmingunum frá søguni og teknar søgugongdina á talvuna ella hevur hana á slides.

Lærarin lesur kvæðið saman við næmingunum. Her er høvi at tosa um týdningin av ørindunum og torfør orð.

## Minnisspæl

Næmingarnir verða býttir í bólkar á 4. Teir skulu nú finna orð í kvæðatekstinum, sum teir ikki skilja.

Hvør næmingur fær nógvar eins pappírslepar. Á ein lepa skrivar hann eitt orð og á ein annan lepa eina frágreiðing ella teknar eina mynd. Soleiðis halda næmingarnir á, til teir hava eini tíggju orð umframt frágreiðingar ella myndir.

Nú er klárt at spæla. Allir pappírsleparnir liggja á borðinum við baksíðuni uppeftir. Næmingarnir skiftast um at venda tveimum kortum. Hoyra kortini ikki saman (orð og røtt frágreiðing/mynd) verða kortini vend við aftur, og næsti næmingurin eigur tørn. Hoyra kortini saman, fær næmingurin tey og sleppur at royna seg enn einaferð. Soleiðis verður hildið á, til øll kortini eru uppi.

## Orðastafett

Torføru orðini kunnu seinni nýtast til „orðastafett". Lærarin leggur leparnar við orðunum á gólvið í endanum á einum longum rúmi og hevur sjálvur frágreiðingarnar til orðini. Síðani býtir hann næmingarnar í tvey ella fleiri lið. Næmingarnir standa í hinum endanum í rúminum – ein úr hvørjum bólki er klárur at renna. Lærarin lesur upp eina frágreiðing til eitt orð, og nú skulu næmingarnir kappast um at fáa fatur á orðinum, sum hóskar til frágreiðingina.

## Gera yvirskriftir og tekna myndir úr kvæðinum

Næmingarnir, saman við lærara, býta kvæðið sundur og gera yvirskriftir til hvønn partin. Hetta verður tikið á talvuni. At enda verða tey ørindi, sum hava størstan týdning fyri søgugongdina, vald (Lærarin kann velja ørindini frammanundan, ella hann kann hava næmingarnar við í avgerðini). Næmingarnir skulu tekna valdu ørindini, og tekningarnar verða hongdar upp í skúlastovuni.

## Teknirøð

Næmingarnir kunnnu eisini gera hvør sína teknirøð um kvæðið Leivur Øssurson. Teir tekna myndina og skriva ørindið undir. Hetta kann evt. nýtast sum eyka-aktivitetur gjøgnum alla gongdina, tá næmingarnir eru lidnir við tað, teir skulu.

## Skipari:

Longu nú kunnu tit royna at finna ein ella fleiri at skipa kvæðið.

# Raðfylgjan í kvæðinum

## Taka afturíaftur

Tosað verður um, hvussu langt vit eru komin við kvæðinum. Eisini verða næmingarnir hoyrdir í teimum ørindunum, teir hava fyri. Hetta kann gerast einsæris, millum næmingarnar ella øll siga í felag. Eisini er eitt gott hugskot at kvøða tey nýggju ørindini sitandi.

## Læra raðfylgjuna í kvæðinum – spæl: Kvæðastafett

Næmingarnir skriva hvør sítt ørindi á ein lepa (næmingarnir mugu gjarna skriva fleiri enn ein lepa, soleiðis at øll ørindini koma til sín rætt). Nú skulu næmingarnir kappast. Býtt verður í tvey lið. Annað liðið fer inn í skúlastovuna at læra seg ørindini, tey hava fyri til næstu ferð, meðan hitt liðið skal leggja ørindini í rætta raðfylgju. Øll samstarva um at leggja leparnar, og lærarin tekur tíð. Tá næmingarnir eru lidnir at leggja leparnar, kannar lærarin (eftir?), um alt liggur rætt. Liggur eitt ørindi skeivt, telur tað minus 10 sek.

Nú skifta liðini um.

Tað liðið, sum megnar at leggja alt uppá stytst tíð, hevur vunnið.

Tit kunnu velja at brúka alt kvæðið, ella bara ein part av kvæðinum, og til ber eisini at spæla fleiri ferðir gjøgnum undirvísingargongdina, so man at enda fær alt kvæðið við.

## Dansa føroyskan dans

Nú kunnu vit dansa føroyskan dans. Næmingarnir duga stevið frá árunum frammanundan og vita, hvussu vit leiðast, tó tað er neyðugt at minna tey á hetta. Snilt er at byrja við einum av teim løttu vísunum fyri at finna stevið – t.d. *Kall og Svein ungi,* Øskudólgur *og sópingarkonan, Veturin kom*, o.s.fr. Vit frámæla at brúka barnasangir í miðdeild, soleiðis at næmingarnir ikki missa áhugan. Síðani verður kvøðið so nógv, sum næmingarnir duga av ***Leivi Øssursson.***

# Ymiskir dansihættir

## Ymiskir dansihættir
Nú verður gjørt eitt sindur burtur úr ymiskum dansihættum. Dansað verður til ymiskar léttar vísur, næmingarnir duga, umframt tað kvæðið, næmingarnir eru í ferð við at læra seg.

Lærarin ger av, hvat næmingarnir royna. Tað kann t.d. vera:
- Hyggja í eyguni á hinum í ringinum og smílast til teirra
- Kvøða spakuliga og hart (royna ymsar 'volumir')
- Kvøða seint og títt (eisini ber til at brúka 'pílin') sí *fylgiskjal 3*
- Hava stórar og smáar rørslur (her ber eisini til at brúka pílin)
- Spyr eisini næmingarnar, hvat teir hava hug til.

Eftir dansin verður tosað um, hvat næmingarnir hildu riggaði best. Hvat var stuttligast, vakrast, rotnast, rættast…. o.s.fr.

## Spurnarkapping
At enda kann lærarin hava spurnarkapping við næmingunum. Tað ber til at nýta *fylgiskjal 1*, ella lærarin finnur upp á spurningarnar sjálvur. Spurningarnir kunnu vera um føroyska dansin, Leiv Øssursson og/ella onnur kvæði næmingarnir hava lært í skúlanum.

# Skaldskapur á mannamunni

## Skaldskapur á mannamunni

Næmingarnir seta seg í ein ring á gólvið. Lærarin tekur ein næming út í gongina og lærir hann eitt ørindi í Leivi Øssursson, sum hann ikki dugir frammanundan.

Næmingurin kemur innaftur, setur seg í ringin og teskar ørindið í oyrað á tí, ið situr við síðuna av. Soleiðis teska tey, til ørindið er komið allan vegin runt. Tann síðsti í ringinum sigur tað hart. Tað eigur helst at vera broytt nú. Út frá hesum kann lærarin greiða frá, hvussu framúr góð kvæðini vóru egnað til at varðveita føroyska søgu.

Hetta spælið kann tillagast til eitt rennispæl. Í staðin fyri at sita í einum ringi, kunnu næmingarnir fáa ymisk pláss eftir gongini, har teir skulu renna hvør til annan og greiða frá tí, teir hava hoyrt.

Hetta kann eisini gerast í tveimum bólkum, soleiðis at næmingarnir kappast um at vita, hvør verður fyrst, og mest umráðandi: hvør mintist best.

Eftir hetta kann man tosa um hvussu skaldskapur á mannamunni riggar, og hvussu eftirfarandi hendan keldan er.

## At enda verður farið uppá gólv.

# Máluppgávur

## Máluppgávurnar
Máluppgávurnar styrkja og stimbra uttanatlæruna og kunnu gerast fleiri ferðir gjøgnum gongdina, bara við ymiskum orðum.

## Kvæði sum fyrisøgn
Kvæði kunnu eisini nýtast sum fyrisøgn.

Lærarin velur tey orðini, næmingarnir skulu skriva í fyrisøgnini, og undirstrikar tey. Næmingarnir lesa uppá heima og fáa eina útfyllingarfyrisøgn at skriva, ella lærarin velur at skriva alla fyrisøgnina, ið næmingarnir fyrireika heima.

- Fyrisøgnin kann skrivast **bak** ímóti **baki**, har næmingarnir ikki skriva tey somu orðini. Næmingarnir standa bak ímóti baki. Næmingur 1 lesur ein setning, meðan næmingur 2 skrivar og øvugt. Soleiðis skiftast teir um.
- Tað kann verða ein **rennifyrisøgn**, har lærarin hevur hongt ørindini upp í skúlagarðinum ella í høllini/gongini, og næmingurin rennur út, lesur eitt ørindi, rennur inn aftur til pappírið og skrivar.
- Tað kann vera ein **samstarvs-rennifyrisøgn** har næmingarnir verða greipaðir í pør. Lærarin heingir ørindini runt í skúlagarðin/høllina. Annar næmingurin rennur til eitt ørindi, lesur, roynir at minnast tað, og rennur síðani aftur til makkaran, ið skrivar tað niður. Minnist næmingurin ikki alt ørindið, má hann renna enn einaferð. Tá eitt heilt ørindi er skrivað, skifta teir um.
- Ein **vanlig fyrisøgn**, har lærarin lesur upp og næmingarnir skriva.
- Ella okkurt heilt annað, sum tær dámar væl at brúka.

Tað er lætt at tillaga fyrisøgnina, tí tú velur sjálv/ur hvørji orð, tú metir næmingarnar vera førar fyri at skriva. Dømi um fyrisagnir eru í *fylgiskjali 7*.

## Bronglut orð
Nú verða ymisk orð tikin úr kvæðinum, og bókstavirnir verða blandaðir, soleiðis at næmingarnir kunnu seta teir saman aftur. Fyri at næmingalaga, ber til at blanda bókstavirnar úr øllum orðunum í einum tilvildarligum ørindi, og allir næmingarnir skulu samla bókstavirnar til orð. Teir, ið verða tíðliga lidnir, kunnu seta orðini í rætta raðfylgju eisini. Eitt dømi um bronglut orð er lagt inn sum fylgiskjal. *Sí fylgiskjal 6*.

## Krossorðagátur
Næmingarnir gera egnar krossorðagátur við orðum úr kvæðinum. Síðani loysa teir hvør hjá øðrum. Sí *Fylgiskjal 4* . Hetta er góð stavivenjing og góð lesifatan.

# Leikur

Kvæði kunnu eisini nýtast sum leikur. Fleiri ymiskir hættir eru at gera hetta.

**Langur leikur:** Til ber at spæla ein longri leik við handriti. Handritið ger lærarin, ella hann ger tað saman við næmingunum. *(sí fylgiskjal 8)*

**Lutaleikur 1:** Kvæðið kann býtast upp í smærri partar, har næmingarnir í bólkum kunnu spæla hvør sín part.

**Lutaleikur 2:** Næmingarnir kunnu vera býttir í bólkar og spæla eitt brot av kvæðinum. Stuttligt er at síggja sama brotið við ymsu tulkingunum, sum næmingarnir finna uppá.

**Ljóðleikur:** dramatisera kvæðið og seta annaðhvørt ljóð frá ljóðførum og/ ella 'beats' og ljóð frá netinum inn, ið hóska til innihaldið. Hetta skapar spenning og huglag.

**Hoyrispæl:** Næmingarnir kunnu gera eitt handrit til kvæðið ella kvæðabrot, og taka tað upp á telefonini.

**Dukkuleikur:** Næmingarnir kunnu gera dukkuleik, antin við seymaðum dukkum ella pappírsdukkum. Frískúlin í Havn hevur eitt so gott dømi um ein slíkan: *https://www.youtube.com/watch?v=IJf8LNMVRZI*

# Endi – at skipa sum frásøguháttur

## Taka afturíaftur

Tosað verður við næmingarnar um, hvussu langt tit eru komin við kvæðinum. Eisini verða næmingarnir hoyrdir í teimum ørindunum, teir høvdu fyri. Hetta kann gerast einsæris, millum næmingarnar ella øll siga í felag. Eisini er eitt gott hugskot at kvøða tey nýggju ørindini sitandi.

## At skipa sum frásøguháttur

Tosað verður um, hvat ein góður skipari er.

- Ein, sum dugir søguna væl
  - Skilir hana – ikki einans uttanatlæra
- Ein, sum dugir at greiða frá søguni
  - Veit, nær hann kvøður hart og ógvusliga ella milt og góðsliga.
- Ein, sum dugir at brúka kroppin at dansa við og vísa við andlitsbránum, hvat hetta snýr seg um
- Hann skal hava góða kondi
- Nakað annað? Spyr næmingarnar um teirra hugsan

## Spæl við tekningunum

Tikið verður afturíaftur tekningarnar, sum vórðu teknaðar í byrjanini. Næmingarnir fáa eina tekning hvør. Nú skulu næmingarnir samstarva uttan orð. Endamálið er stilla seg í rætta raðfylgju eftir tekningunum, sum vóru viðkomandi fyri søgugongdina. Tá næmingarnir standa rætt, sláa teir ring og fara at kvøða.

## Nú sleppa næmingarnir reiðiliga at royna seg sum skiparar og skipa „sína tekning".

## At enda:

At enda verður tikið afturíaftur og tosað um:

- Hvat snýr hetta kvæðið seg um?
- Hvat er tað at skipa?
- Hvat er góður føroyskur dansur?

# Dagstúrur

Í sambandi við Leiv Øssursson er gott hugskot við einum dagstúri ella setursskúla til Gøtu. Har ber til at ganga í fótasporum Tróndar við at vitja standmyndina av Tróndi í Gøtu og Tróndargrund. Harumframt er eisini møguleiki at vitja søguligu Blásastovu, har næmingarnir kunnu læra um gamlar tíðir og gomul amboð.

Hvørt ár er skúlafótbóltur fyri allar flokkar í Vági. Verður farið til Suðuroyar, kann vísast á nógv, ið samantvinnar Brestiskvæði, Sigmundskvæði yngra og Leiv Øssursson:

- teinin Sigmundur svam
- Lítlu Dímun, har Sigmundur og Tórir vóru á fjalli við fedrum sínum
- Stóru Dímun, har stríðið millum Sigmund og Trónd í veruleikanumm byrjaði við deyða Brestis og Beinis.
- Sandvík, har Sigmundur varð dripin, og har Tróndur hevndi Sigmunds deyða.
  - Her stendur ein standmynd av Sigmundi niðri við sjóvarmálan, sum Hans Pauli Olsen hevur gjørt
  - Her er lættur og vakur gongutúrur í Rituskor, sum flest allir næmingar kunnu ganga.

Hov, haðan Øssur Havgrímsson, faðir Leiv Øssursson var. Abbi Leiv Øssursson drap Brestir.

# Borðspæl – Kvæða-quiz




## Soleiðis spælir tú.

Fyrst verða næmingarnir býttir í bólkar. 2-4 spælarar eru í hvørjum bólki.

At byrja við gera næmingarnir so nógvar spurningar til kvæði, sum teir megna. Spurningarnir verða skrivaðir á smáar lepar. Bólkur 1 ger spurningar til bólk 2, bólkur 2 til bólk 3 o.s.fr.

Næmingarnir hava allir ein brikk hvør, og øll byrja hjá skiparanum.

Tað snýr seg um at vera fyrstur frá skiparanum til endan, og vit dansa øll til vinstru. Næmingurin ringlar og flytur, men fyri at sleppa at flyta, skal hann svara einum spurningi rætt. Svarar hann skeivt, verður hann verandi í stað.

Lendir næmingurin á "Dansa í ringi" og megnar at svara spurninginum rætt, sleppur hann at ringla umaftur. Svarar hann skeivt, skal hann aftur har, sum hann stóð frammanundan.

Lendir næmingurin á "Skift pláss" (frameftir) sleppur hann hagar, sum pílurin vísir, um hann svarar spurninginum rætt. Lendir næmingurin harafturímóti á "skift pláss" (aftureftir), skal næmingurin beinleiðis aftur har, sum pílurin peikar. Svarar hann rætt, sleppur hann at standa har, sum pílurin vísir. Svarar hann skeivt, skal hann bakka líka nógv eygu, sum hann fekk.

### Tú skalt brúka:

- 1 Kvæða-quiz bretti hvønn bólk
- Lepar at skriva spurningar á
- 1 terning til hvønn bólk
- Brikkar til næmingarnar at flyta

# Fylgiskjal 1
# – Spurnarkapping

Spurnarkappingin kann skipast, sum tú sjálv/ur hevur hug til, ella tú kanst nýta hugskotið niðanfyri.

Vit nýta samstarvslæru. (cooperative learning)

Næmingarnir eru býttir í bólkar á 3. Næmingarnir í hvørjum bólki skulu hava hvør sítt tal frá 1-3. Lærarin setur spurningin. Næmingarnir tosa saman í bólkunum, og vera samdir um, hvat svarið er. Lærarin sigur eitt tal. Allir næmingar við tí talinum (t.e. 1 næmingur úr hvørjum bólki) reisa seg, og skulu siga hart, hvat teirra bólkur hevur svarað. Var svarið rætt, fær bólkurin 1 stig. Var svarið skeivt, fær bólkurin einki stig.

1. Tá vit dansa føroyskan dans, hvør hond er omaná?
2. Tá vit dansa føroyskan dans fara vit tvey fet til...?
3. Hvørjum búði Leivur Øssursson hjá? (Tróndi)
4. Hvar búðu teir? (í Gøtu)
5. Hvar fóru teir at finna konu til Leiv Øssursson? (Til Skúvoyar)
6. Hví var Leivur bangin fyri at hann ikki fór at fáa gentuna? (Hon var dóttir Sigmund)
7. Hvørjar treytir setti Tóra Sigmundsdóttir?
   a. *Leivur skuldi ikki hava dripið Sigmund*
   *b. Hann skuldi finna útav hvør hevði dripið Sigmund*
   *c. Hann skuldi hevna Sigmunds deyða*
8. Hvagar fór Tróndur fyri at finna drápsmann Sigmunds? (Til Suðuroyar/Sandvík)
9. Hjá hvørjum skuldi Tróndur gista? (Torgrími ónda/illa)
10. Hvussu nógvar synir átti Torgrímur? (2)
11. Hvat segði Torgrímur illi um deyða Sigmunds? (Tað gingu fleiri søgur, summi søgdu, at hann var dripin, meðan onnur søgdu, at hann var druknaður)
12. Hvat er eitt rúnarkelvi? (Tað er eitt petti av træi við rúnarskrift á, sum Tróndur brúkti at ganda við)
13. Hvat skuldu allir menninir gera tá Tróndur fór at ganda? (Tiga)
14. Hvussu nógvir hamir komu á dyr? (tríggir)
15. Hvussu vorðnan kappa hevði Sigmundur? (Reyðan)
16. Hvat segði Tróndur var hent við Tóri, Einari og Sigmundi? (Tórir og Einar vóru druknaðir, og Sigmundur var dripin)
17. Hvat skuldu teir finna fyri at prógva, at Torgrímur hevði dripið Sigmund? (ein gullring)
18. Hvat gjørdu teir við Torgrím og synirnar? (Hongdu teir í ein gálga)
19. Hvat gjørdi Tróndur, tá hann hevði útrættað hetta? (Hann fór til Gøtu)
20. Hvat gjørdi Leivur tá? (Hann fór til Skúvoyar til Tóru)

# Spurnarkapping

| | |
|---|---|
| 1 | |
| 2 | |
| 3 | |
| 4 | |
| 5 | |
| 6 | |
| 7 | |
| 8 | |
| 9 | |
| 10 | |
| 11 | |
| 12 | |
| 13 | |
| 14 | |
| 15 | |
| 16 | |
| 17 | |
| 18 | |
| 19 | |
| 20 | |

**Bólkur**

# Fylgiskjal 3

Pílanæmingurin í miðjuni stýrir ringinum við pílinum.
Hann kann t.d. stýra tempo: skjótt/spakuliga, lívligt/minni, høgt/lágt, rópa/teska vm.



## Dømi



# Fylgiskjal 4: Krossorðagáta



**Skriva orðini her:**

# Fylgiskjal 5: Kekklisti

| Ørindi: | 1 | 2 | 3 | 4 | 5 | 6 | 7 | 8 | 9 | 10 | 11 | 12 | 13 | 14 | 15 | 16 | 17 | 18 | 19 | 20 | 21 | 22 | 23 | 24 | 25 | 26 | 27 | 28 | 29 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |

# Fylgiskjal 6

## Brongliorð 1

1. Gevið ljóð og lýðið á,
Meðan dagur líður
Kvøðið um Leiv Øssursson
Tann hin garpin fríða

2. Leivur vaks hjá Trónda upp
Bæði vænur og vitur
Vaksin var hann manniliga
Fagur var hans litur

3. Tróndur situr í hásæti
Ræður hann síðst at telja
Gift teg Leivur Øssursson
Tú hevur gott í at velja

4. Leivur svarar so brádliga,
Hana kann eg ikki fáa
Hennara móður ber hat til mín
Hon man henni ráða

## Brongliorð 1

1. ððýli ____________________
rudga ____________________
kðvøði ____________________
rgpani ____________________

2. jhá ____________________
æuvnr ____________________
nnmiaglia ____________________
rufga ____________________

3. trsui ____________________
jleta ____________________
egt ____________________
ruhve ____________________

4. igbdlará ____________________
Nkna ____________________
Uómrð ____________________
Áarð ____________________

## Brongliorð 2

5. Leivur svaraði brádliga:
„Hana kann eg ikki fáa,
hennara móðir ber hat til mín,
og hon man henni ráða.“

6. Til svaraði Tróndur gamli,
heldur at tí gaman:
“Eg skal sjálvur fylgja tær,
tit skulu væl koma saman.“

7. Klæddust teir í klæðir,
klæddust teir í skrúð,
vundu upp segl á Tróndar skútu
at vinna ta ríku frú.

8. Inn kom sveinur í Skúvoy,
talar so fyri orð:
„Eg síggi eina so stóra skútu,
sigla mót Dalaskor.“

## Brongliorð 2

5. raavisð ______________________

naerahn ______________________

neihn ______________________

6. urórnTd ______________________

redluh ______________________

jygfal ______________________

mnaas ______________________

7. utldkdæs ______________________

kúðsr ______________________

tsúuk ______________________

kruí ______________________

8. sveinur ______________________

aartl ______________________

gígsi ______________________

oakaDrls ______________________

## Brongliorð 3

9. Eg síggi eina so stóra skútu
undan skorum líða,
sólin skínur so fagurliga
á teirra seglið fríða."

10. „Sært tú skip mót Dalaskor,
sól í segl at skína,
vera man einhvør ungur maður
at biðja dóttur mína."

11. Hildu síni ferðini
beint mót oynni vestur,
síðani gingu frá strondum niðan
Tróndur og Leivur reysti.

12. Leivur gekk at húsi fram
inn um hallardyr,
eingin hevur sæð reystari ungling
komið í oynna fyrr.

## Brongliorð 3

9. ósatr ____________________

mokrus ____________________

uarlgfgai ____________________

ðesilg ____________________

10. ræst ____________________

níska ____________________

rhvineø ____________________

baiðj ____________________

11. riefnið ____________________

nnoiy ____________________

ðanin ____________________

eruviL ____________________

12. súhi ____________________

llardaryh ____________________

tryesria ____________________

miðok ____________________

## Bronglioð 4

13. Tróndur stendur á hallargólvi,
ber fram kvøðu sína:
"Hoyr tú, ríka Sigmunds einkja,
gev honum dóttur tína."

14. Tað var ríka Sigmunds einkja,
var so bráð at svara:
"Tað er mær so hart ímót,
hon skal so burtur fara.

15. Øssur tók alt Sigmunds góðs,
tað er frætt so víða,
Leivur, væntar tú mína dóttur,
leingi skalt tú bíða."

16. Til tað svaraði Tróndur hin gamli,
mundi ei orðum spara:
"Leiðið mær moy í høllina inn,
sjálv fyri seg at svara."

## Bronglioð 4

13. dsernut ______________________

vøkuð ______________________

jneaik ______________________

urdtót ______________________

14. írak ______________________

rasav ______________________

tmíó ______________________

tburru ______________________

15. ðsóg ______________________

rttfæ ______________________

nærvat ______________________

gelnii ______________________

16. asarivð ______________________

rmuoð ______________________

ymo ______________________

ájvsl ______________________

# Fylgiskjal 7

## Fyrisøgn 1

1. Gevið ljóð og lýðið á,
Meðan dagur líður
Kvøðið um Leiv Øssursson
Tann hin garpin fríða

2. Leivur vaks hjá Trónda upp
Bæði vænur og vitur
Vaksin var hann manniliga
Fagur var hans litur

3. Tróndur situr í hásæti
Ræður hann síðst at telja
Gift teg Leivur Øssursson
Tú hevur gott í at velja

4. Sigmunds einkja á Skúvoy býr,
hon eigur dóttur væna,
túført ikki frægari giftu,
hevði tú fingið hana."

## Fyrisøgn 1

1. Gevið ___________________ og ___________________ á,

___________________ dagur ___________________

Kvøðið um ___________________ Øssursson

Tann hin ___________________ ___________________

2. Leivur ___________________ hjá ___________________ upp

Bæði ___________________ og vitur

___________________ var hann ___________________

___________________ var hans litur

3. Tróndur ____________________ í ___________________

Ræður hann ___________________ at ___________________

___________________ teg Leivur Øssursson

Tú ___________________ gott í at ___________________

4. Sigmunds einkja á ___________________ býr,

hon eigur ___________________ ___________________,

tú ___________________ ikki ___________________ giftu,

hevði tú ___________________ hana."

## Fyrisøgn 2

5. Leivur svarar so brádliga,
Hana kann eg ikki fáa
Hennara móður ber hat til mín
Hon man henni ráða

6. Til svaraði Tróndur gamli,
heldur at tí gaman:
“Eg skal sjálvur fylgja tær,
tit skulu væl koma saman.”

7. Klæddust teir í klæðir,
klæddust teir í skrúð,
vundu upp segl á Tróndar skútu
at vinna ta ríku frú.

8. Inn kom sveinur í Skúvoy,
talar so fyri orð:
“Eg síggi eina so stóra skútu,
sigla mót Dalaskor.”

## Fyrisøgn 2

5. Leivur ___________________ so ___________________,

Hana ___________________ eg ikki ___________________

Hennara ___________________ ber ___________________ til mín

Hon man henni ___________________

6. Til ___________________ Tróndur ___________________,

___________________ at tí ___________________:

„Eg ___________________ sjálvur ___________________ tær,

tit ___________________ væl ___________________ saman."

7. ___________________ teir í ___________________,

klæddust ___________________ í ___________________,

___________________ upp segl á ___________________ skútu

at ___________________ ta ___________________ frú.

8. Inn kom ___________________ í ___________________,

___________________ so fyri ___________________:

„Eg ___________________ eina so ___________________ skútu,

___________________ mót Dalaskor."

## Fyrisøgn 3

9. Eg síggi eina so stóra skútu
undan skorum líða,
sólin skínur so fagurliga
á teirra seglið fríða."

10. „Sært tú skip mót Dalaskor,
sól í segl at skína,
vera man einhvør ungur maður
at biðja dóttur mína."

11. Hildu síni ferðini
beint mót oynni vestur,
síðani gingu frá strondum niðan
Tróndur og Leivur reysti.

12. Leivur gekk at húsi fram
inn um hallardyr,
eingin hevur sæð reystari ungling
komið í oynna fyrr.

## Fyrisøgn 3

9. Eg ___________________ eina so stóra ___________________

undan ___________________ líða,

sólin ___________________ so ___________________

á teirra ___________________ ___________________."

10. „___________________ tú ___________________ mót Dalaskor,

sól í ___________________ at ___________________,

vera man ___________________ ungur ___________________

at ___________________ ___________________ mína."

11. Hildu síni ___________________

___________________ mót ___________________ vestur,

síðani ___________________ frá strondum ___________________

___________________ og Leivur ___________________.

12. ___________________ gekk at ___________________ fram

inn um ___________________,

___________________ hevur sæð ___________________ ungling

___________________ í ___________________ fyrr.

# Fylgiskjal 8 – Leikur við frásøgn og ljóði

## Leivskvæði

***Leikarar:***
Frásøgufólk
Leivur
Tróndur
Drongur
Sigmundseinkjan
Torgrímur Illi

Ímeðan *frásøgufólkið lesur upp, gera leikararnir tað, ið sagt verður.*
*Næmingarnir finna sjálvir upp á ljóð, ið hóska til*

*Frásøgufólk* – Leivur Øssursson er ein vakur og gløggur ungur maður. Hann er abbasonur Havgrím úr Hovi, sum var myrdur úti í lítlu Dímun hina ferðina.

Leivur vaks upp hjá Tróndi í Gøtu. So ein dagin sigur Tróndur við hann:
– Tú Leivur! eg haldi, tú skalt gifta teg. Tú ert so vakur og ríkur, tú fært allar tær gentur, tú vilt hava. Eg haldi, at tú átti at farið út til Skúvoyar at biðja um dóttur Sigmund, Tóru. Hon er ein tann besta í øllum Føroyum.

*Leivur* – Ikki tvætla! Mamma hennara ræður henni, og hon hatar meg, tí hon heldur abbi og tú drupu Sigmund.

*Tróndur* – Svass! Eg skal koma við tær út. Tit skulu so víst koma saman.

*Frásøgufólk* – Teir lata seg í tey fínastu klæðini og gera skipini klár. Og flott er at síggja, tá ið teir leggja frá landi.

Úti í Skúvoy kemur ein *drongur* spurtandi inn á Sigmundsgarðin.
– Eg síggi eitt ordiliga stórt skip sigla beint móti Dalaskor. Seglini eru so flott, nú sólin skínur á tey.

*Sigmundseinkjan* – Ja, so man tað vera onkur, ið kemur at biðja um dóttur mína.

*Frásøgufólk* – Tróndur og Leivur fylgjast og ganga so raskir upp á oynna. Tá ið Leivur stígur inn á garðin, standa øll bara og gapa. Soooo vakran ungling hava tey ongantíð sæð áður.

*Tróndur* er eisini komin innar og sigur ørindi síni:
– Hoyr tú, ríka Sigmunds einkja, gev Leivi dóttur tína.

*Sigmundseinkjan* – Nei, Tróndur gamli. Soooo illa skal hon ikki fara. Pápi hansara, Øssur, tók allar ognir Sigmunds, tað vita øll. Abbi hansara …. ella tú….. drap abba hennara. Og nú væntar tú, at eg skal geva soni Øssuri dóttir mína. Hvat billar tú tær inn? Tú kemur at bíða leingi.

*Tróndur* – Ikki spilla tíðina, kalla mær Tóru sjálva inn í høllina. So kann hon sjálv sleppa at svara.

*Frásøgufólk* – Inn kemur Tóra Sigmundsdóttir. Tá ið hon hyggur at Leivi, bráðnar hjarta hennara:

*Tóra* – Leivur, er tað títt ørindi, at tú vilt hava meg? Um so er leggi eg tær tríggjar treytir á. Um tú kanst uppfylla tær, vil eg fegin vera tín.
Hesar eru treytirnar:
- Tann fyrsta treytin er, at tú skalt svørja, at tú ikki hevur dripið pápa mín.
- Tann næsta treytin er, at tú skal finna drápsmannin, sum gjørdi okkum so ilt.
- Tann triðja treytin er, at tú skal HEVNA pápa mín.

TÁ skal eg gerast kona tín.

*Leivur* – Tóra, Tóra. Tað svørji eg við sannan Gud, eg drap ikki Sigmund, faðir tín.

*Tróndur* – Tit skulu skjótt frætta, hvør drápsmaðurin er. Hevndina skal eg sjálvur fremja.

*Frásøgufólk* – Síðan fóru teir umborð á skip sítt aftur og sigldu av Skúvoyar landi.

***Frásøgufólk:* Nakrar vikur seinni – nú eru vit stødd í Suðuroy – í Sandvík:**

*Frásøgufólk* – Tróndur og hansara menn eru komnir til Suðuroynna. Fleiri menn eru við honum, og hann hevur rúnarkelvið við sær. Gandastavin!!! Torgrímur Illi stendur í hurðini og hyggur út á hav.

*Torgrímur* – Hvat man Gøtu Tróndur vilja higar at mínum sandi?

*Frásøgufólk* – Torgrímur eigur tveir synir, sum báðir eru illir og óndir í sinnalag. Teir líkjast pápa sínum.

*Tróndur* stígur á land og sigur:
– Torgrímur, kunnu eg og mínir menn fáa innivist hjá tær í nátt? vit ætla okkum at kanna deyða Sigmunds. Vita tit nakað um tað?

*Torgrímur* – Tú veitst. Tað verður slatrað. Nógvir siga, at tað var tú, ið drap hann. Summir siga, at hann doyði av møði, tí tað var so strævið at svimja higar. Tað er so ymiskt, hvat fólk siga.

*Tróndur* – At hann varð myrdur, er helst tað sanna. Hugsi eisini, at tað var tú sjálvur, ið drap hann. – vendir sær til menn sínar: – Gerið sum eg sigi. Bindið mær Torgrím Illa og synir hansara. So skal eg vísa tykkum, hvussu Sigmundur, Tórir og Einar doyðu. Nú fari eg at ganda, og her skal vera púrasta (friður) kvirt? inni.

*Frásøgufólk* – Tróndur, tann sterki gandakallurin, settist í sessin, sum stóð við eldstaðin og fór at ganda.

*Frásøgufólk* – Knappliga gongur hurðin: Ljósið skínur bleikt. Ein maður

kemur innar. Stillar seg mitt á gólvið. Hann er í dýggjvátum klæðum. Hann breiðir armarnar út og gongur síðan út aftur gjøgnum hurðina.

*Frásøgufólk* – So gongur hurðin aðru ferð – Harðliga: Inn kemur maður og fer tætt at eldstaðnum. Sjógvurin streymar frá honum. Menninir, sum inni sita, eru hjartkiptir. Siga einki. Síðani hvørvur hamurin út aftur gjøgnum dyrnar.

*Frásøgufólk* – Lítla løtu seinni brestur hurðin upp á triðja sinni. Tað buldraði so illa, at jørðin skalv. Ein stórur maður kemur innar. Hann hevur eitt blóðugt høvd undir arminum. Hann var í reyðum kappa. Brádliga snaraði hann sær á og hvarv.

*Tróndur* reisist og vendir sær til fólkið:
– Nú síggja tit sjálvir, hvussu teir tríggir doyðu. Eingin ivi, at Sigmundur er dripin. og at Einar og Tórir eru druknaðir. Sigmundur átti ein stóran ring úr reyðargulli. Finna tit hann hjá Torgrími, so er málið loyst.

*Frásøgufólk* – Menninir leita allastaðni í húsinum. Teir finna so ringin í eini kistu. Ringurin er vavdur inn í kloddar.

*Tróndur* – her er einki at bíða við. Setið ein gálga upp av sterkum bjálkum. Har skal Torgrímur hanga saman við synum sínum.

*Frásøgufólk* – Síðani siglir Tróndur aftur til Gøtu, og glaður er Leivur, tá ið hann frættir, hvussu tað hevur gingist. Og hann fer beint til Skúvoyar til sína hjartans kæru og sigur við Tóru:

*Leivur* – Nú er pápi tín hevndur, nú skalt tú kona mín vera. „

*Frásøgufólk* – Og so giftust Leivur og Tóra, og alt stríð fekk ein enda.